# Bil til heimsins størsta mann

**Lívið er ikki so einfalt fyri tey sum blíva óvanliga stór og viga tvær ferðir so nógv sum vanlig fólk. Heimsins størsti maður, sum býr í Ukraina, fekk herfyri ein sergjørdan bil handaðan av forsetanum í landinum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Heimsins største maður, 36 ára gamli Leonid Stadnyk í Ukraina, fekk herfyri ein sergjørdan Chevrolet Tacuma, sum ukrainski forsetin Viktor Yushchenko handaði honum.

Chevrolet bilurin er einki broyttur uttan, men innan er nokk so nógv gjørt fyri at Leonid kann sita í honum. Neyðugt varð at styrkja fleiri konstruktiónir sum t.d. setrini, so tey kunnu halda til hansara 200 kg.

Leonid Stadnyk er føddur í 1971 í Ukraina. Hann er 2.59 m langur og vigar 200 kg.

Sambært Guinness World Records 2008 er hann heimsins største maður.

Leonid Stadnyk byrjaði at vaksa so nógv eftir eina operatión í høvdinum, tá hann var 14 ára gamal. Hann er útbúgvin djóralækni og arbeiðir eisini sum djóralækni og býr saman við mammu síni í bygdini Podolyantsi í Ukraina.



*Fjølmiðlarnir vilja gjarna hava eitt prát við heimsins størsta mann*



*Forsetin í Ukraina, Viktor Yushchenko, handaði heimsins størsta manni, Leonid Stadnyk, hendan bilin, ein sergjørdan Chevrolet Tacuma*



*Leonid Stadnyk og forsetin skulu royndarkoyra bilin*



*Leonid Stadnyk takkar forsetanum fyri bilin*



*Tað sær út sum forsetin er spentur upp á, um Leonid Stadnyk passar inn í bilin*